**Í ár vann kendi turkiski høvundin, Orhan Pamuk, Bókmentavirðisløn Nobels. Heimsins kendasta bókmentavirðisløn er ofta spádd at fara til hann fyrr ella seinni. Hann hevur verið í uppskoti fyrr til Nobelvirðislønina**



*Kendi turkiski høvundin, Orhan Pamuk, vann í ár Bókmentavirðisløn Nobels.*

# Nobelvirðslønin til turkiska Orhan Pamuk

NOBELVIRÐISLØN
*Kim Simonsen*

Seinasta skaldsøgan hjá Pamuk var bókin “Kar” (á donskum “Sne”) frá 2002 (donsk utgáva frá 2006). Her er evni serliga tvístøðan millum islamismu og vesturlenskan modernitet í Turkalandi í dag. Hon er um útlegd, eksil og um tap av samleika.

Í 2005 kom so “Istanbul – Memories of a City”, ið er partvíst endurminningar og essays.

### Ein modernaður turkiskur høvundi

Pamuk hevur eina serliga støðu, sum ein av teim fremstu og mest modernaðu vesturlensku turkisku intellektuellu, ið m. a. hava talað at turkiska drápinum av armenarum. Pamuk er bæði elskaður og nógv lisin í Vesturevropa.

Við hesum kemur Pamuk, við í fína felagið, har Harold Pinter seinasta kom við (2005), Elfriede Jelinek (2004), J.M. Coetzee (2003), Imre Kertész (2002), V.S. Naipaul (2001), Gao Xingjian (2000), Günter Grass (1999), José Saramago (1998), Dario Fo (1997) og onnur.

Annars var sýriski yrkjarin Adonis, ella Ali Ahmad Said, ein sum nógv roknaðu fór at fáa virðislønina í ár.

Adonis er ein av teim bestu yrkjarunum eg havi lisið. Eri vísir í at hann fær hesa virðisløn skjótt.

### Ein kontroversiellur skribentur

Herfyri fekk Pamuk Friðarvirðislønina hjá Týsku Bókamessuni. Hann nýtti høvið at tosa um at Turkaland skal við í ES. Til Politiken tók hann m.a. til:

”Vit vita øll, hvussu nógvur stoltleiki og tá fólk eru ov stolt, tá er altíð ein skuggi av skomm og eyðmýking av øðrum. Tá onkur kennir seg djúpt eyðmýktan, kunnu vit vænta at síggja eina nationalismu vaksa fram. Tá turkarar hoyra seg sjálvar umtalaðar í fordømandi vendingum, verða teir enn einaferð mintir um, at teir standa og banka á eina hurð og bíða eftir at onkur lovar teimum inn. Teir kenna seg sjálvandi ikki vælkomnar. So løgi sum tað ljóðar, so hevur útbreiðslan av antiturkiskum kenslum skapt eina grovan nationalistiskan bakstoyt í Turkalandi”.

Pamuk er ein djarvur høvundi og intellektuellur, tí hann hevur verið í vanda fyri at kunna fáa upp til trý ára fongsul, fyri at hava tosað um armenarnar.

Vit hava í Vesturheiminum langan sið fyri at finnast at samfelagnum og religión, hetta er ikki so við islam, her er Pamuk helst eitt dømi um ein sum nærum varð revsaður fyri síni orð.

Problemið við Pamuk, ella við viðurskiftinum hjá Pamuk við heimlandið Turkaland, er at landið ikki enn vil viðurkenna atfinningar og fongslar intellektuell, ið ikki lovar gott fyri eitt komandi limaskap í ES. Enn eru fá muslimsk lond, har tað er ein farbarur millumvegur millum Muhammed og modernitet.

### Samanrenning av mentanum

Orhan Pamuk, kann nú endeliga fara heim við Bókmentavirðisløn Nobels. Í grundgevingini sigur nevndin m.a., at: ”Hann í leitanini eftir melankolsku sálini í síni føðibýi hevur uppliva nýggj symbol fyri samanbrestin og samanrenningina millum mentanir”.

54 ára gamli Pamuk er hin best dámdi turkiski høvundin uttan fyri Turkaland. Í heimlandinum er hann, sum nevnt, sera illa dámdur mangan.

Ein serlig øði kom at raka hann, tá hann við eitt blað segði, at fólkadrápið á armenarnar kostaði 1. millión fólkum lívið. Eisini vóru yvir 30.000 kurdarar dripnir í 1915. Hetta skapti eitt øgiligt rok í Turkalandi. Pamuk varð ákædur fyri at vera ein landasvíkjari og fyri at hava sært turkiska samleikan.

Politiken veit at siga, at Pamuk er so illa dámdur í Turkalandi, at ein kanning vísti, at hann hevði fýra ferð so nógv mótstøðufólk enn viðhaldsfólk.

Í 2005 varð Pamuk noyddur at flýggja av landinum, tí hann var sera álvarsliga hóttur. Hetta var eftir at hann hevði haft kendu samrøðuna við eitt blað frá Sveits. Hann kom aftur seinni í 2005, tá hann skuldi verja seg móti ákærunum móti honum. Hann segði sjálvur tá, at hann vildi verja tælufrælsið, ið er einasti møguleikin hja Turkalandi at sóna seg við søguna, tí tað sum hendi við ottomansku armeniarunum frá 1915-1917 er nakað, ið turkiska tjóðin hevur fjalt, men vit eiga at kunna tosa um fortíðina”.

### Turkiskur minnispolitikkur

Turkaland er eitt av teim mest nationalistisku londunum vit kunnu hugsa okkum. Har valdar ein serliga strangur minnispolitikkur og ein sterkur samleikapolitikkur, ið Pamuk hevur gjørt av at tala at.

Hann sigur t.d.: ”30.000 kurdarar hjá okkum eru dripnir og ein millión armenarar og eingin torir at siga tað”.

Tað var ikki fyrr enn Turkaland varð hart átala av ES, at landið uppgav ákæruna móti Pamuk fyri landasvík.

Tað áhugaverda við minnispolitikki sum hesum, er at minni kann brúkast til at finnast at, lasta ella skemma, men eisini til at legitimera ein serligan almennan samleika. Felags minni er við til at skapa samleikar, her hevur minni, serliga goymd minni og traumatisk minni ein serligan leiklut. Vit kunnu síggja intellektuell og høvundar loypa a lond, ið ikki vilja minnast okkurt, tí tað er skaðiligt fyri teirra samleikapolitikk og hin vegin lond, har fólk gera alt fyri at minnst at tey vóru pínd og myrd, um hetta so var fyri 700 árum síðani. Í minnispolitikki spæla løstir og trauma ein sera virkna lut. Søga, ella rættari, minni verður brúkt til at legitimera rørslur og vald í nútíðini. Og tey sum siga hesum ímóti, fáa harðar ábreiðslur og sum við Pamuk, verða hesi harðliga forfylgd.

### Stuðlaður av heiminum

Í Turkalandi er nógv sum halda, at Pamuk serliga fekk áhuga fyri kurdiska probleminum og fyri armenarunum, eftir at enski sjónleikahøvundin Harold Pinter fekk Bókmentavirðislønina Nobels í 2005, men hetta eru sjálvandi gitingar.

Stuðulin var øgiligur frá umheiminum. Hann fekk stuðul frá ES. Annesti International, PEN America Center, United Nations International Covenant on Civil and Political Rights og European Convention on Human Rights. Í 2005 skrivaði høvundar sum José Saramago, Gabriel Garcia Márquez, Günter Grass, Umberto Eco, Carlos Fuentes, Juan Goytisolo, John Updike og Mario Vargas Llosa honum eina yvirlýsing, har teir vildu verja hann móti ákærum.

Nevndin sum hevur givið Pamuk Bókmentavirðislønina Nobels, sigur, at Orhan Pamuk fekk altjóða gjøgnumbrot við skaldsøguni ”Det hvide slot”, ið er ein søguliga skaldsøga um forholdið millum ein træl frá Venedig og ein ungan skúladrong, sum keypir hann.

Nevndin sigur eisini, at Pamuk spælir við hvussu persónmenskan og dublettir, tema og annað kemur fram í bókini ”Den sorte bog” frá 1996, har høvuðspersónurin leitar kring Istanbul fyri at finna konuna og hennar hálvbróðir, sum høvuðspersónurin seinni skiftir samleika við.

Pamuk arbeiðir við samanbestinum millum fortíð og nútíð, eystur og vestur, islam og sekulera samfelagið.

Við virðislønini fær Pamuk 10. milliónir svenskar krónur.

*Keldur:*
*Orhan Pamuk »Min vision for Europa«, kronikk í Politiken, 30. oktober. 2005. DR2*